# ndamentalistar



## "Hvørja friðartilgongd?"

Fyri at fáa eina betri fatan av lívinum hjá vanligum fólkum í økinum, ferðaðist Heini í Skorini nógv í muslimsku pørtunum av Palestina, Gaza og Vestara áarbakka. Og meðan hann fekk alt fleiri vinfólk í økinum, fingu hansara eygleiðingar frá sendistovuni spakuliga eitt øðrvísi menniskjaligt andlit.

- Harvið fekk hatrið eisini eitt andlit, tí sjálvt um míni vinfólk, bæði tey muslimsku og og tey jødisku, vóru bæði intelligent, kærleiksfull og moralsk, vóru tey samstundis djúpt militant og summi enntá fundamentalistisk, sum jú er ein stór andsøgn. Vit høvdu endaleysar diskussiónir um hetta stríðið, men argumentini fyri vápnahvíld og friði hava altso ikki somu ávirkan, tá tú kjakast við ein ungan mann, sum júst hevur mist beiggja sín í einum bumbuálopi, sigur Heini í Skorini, sum ofta mátti bíta nógv í seg.

Ikki minst tær løturnar, hann hevði tosað seg heitan um friðartilgongdina, sum var hansara dagliga arbeiðsøki á sendistovuni, og onkur so hugdi upp og spurdi: "Hvørja friðartilgongd?"

- Tað er sjálvandi beiskt at slúka, at øll vón um frið er tveitt fyri borð. Men eg skilti tey væl. Tað er ringt at fáa eyga á nakra friðartilgongd í einum øki, har børnini mugu skora seg millum hernaðarbilar á veg í skúla, og har allir veggir eru yvirmálaðir við slagorðum, sum hálova kríggi og eggja til enn meiri harðskap. Eg hevði sjálvur uttan iva eisini blivið militantur, um eg vaks upp í slíkum umstøðum, sigur Heini í Skorini hugsanarsamur og heldur fram.

- Eg nevndi í áðni, at tað kom óvart á meg at síggja, hvussu intenst tey hóast alt liva. Og tað er rætt. Men hinvegin – sjálvt um tey nokta at halda uppat at dansa, hóast teirra diskotek júst er sprongt í luftina, so hongur vónloysið í veruleikanum tungt í luftini. Eg ivist í, um vónirnar fyri friði millum fólkið har nakrantíð hava verið daprari.

## Ónd ringrás

Sjálvt um tað kann vera freistandi at koma við løttum loysnum, minnir Heini í Skorini á, at stríðið í Miðeystri er eitt dømi um, hvussu ein politiskur knútur kann gerast nærmast óloysiligur, tá átrúnaður og politikkur renna saman. Ein partur av endaleysa stríðnum er, at tvær heimsreligiónir, jødadómurin og islam, gera krav uppá fult vald yvir heilaga landinum. Uttan kompromis.

Men stríðið snýr seg eisini um verðsligan politikk, um nationalismu og um kravið um eitt heimland hjá tveimum fólkasløgum, sum ikki viðurkenna sama rættin hjá hinum partinum. Bæði jødar og palestinar hava verið fyri endaleysum órættvísi, og báðir partar krevja rættvísi fyri sítt fólk. Tað snýr seg stutt sagt um at yvirliva yvir fyri fíggindanum. Og hóast hernaðarligi styrkismunurin millum tað sterka og ríka Ísrael og teir máttleysu og fátæku palestinararnar ikki kann yvirmetast, so heldur stríðið fram millum ísraelska statsherin og palestinskar militsir og yvirgangsbólkar, sum aftur og aftur raka Ísrael meint væl vitandi um, at hevndin kemur tíggju ferðir so ógvuslig aftur við miklum sivilum skaða. Úrslitið er ein ónd ringrás við kríggi og líðing. Hinvegin ivast Heini í Skorini ikki í, hvør fremsta fortreytin er fyri friði.

- Um Ísrael steðgar hersetingini av palestinsku økjunum, so hvørvur eisini fremsta umberingin hjá palestinum at leypa á Ísrael. Báðir partar mugu síggja í eyguni, at tað ikki finst ein hernaðarlig loysn. Antin tapa báðir partar við framhaldandi kríggi, ella vinna báðir partar við samráðingum og eini friðaravtalu. Partarnir hava áður verið heilt tætt eini endaligari friðaravtalu, seinast í ár 2000, men hvørja ferð er tað eydnast ekstremistum báðumegin at oyðileggja eina søguliga semju millum Ísrael og Palestina, og alt er bumbað aftur til ár null. Nú er so enn eitt samráðingarumfar fingið í lag, men enn er eingin friður í eygsjón.

## Út úr líkasæluni

Og meðan grannarnir í Ísrael og Palenstina hildu á at berjast, setti Heini í Skorini seg fyri góðum mánað síðani í eitt flogfar á veg heim til Føroyar. Tíðin sum starvslesandi og eygleiðari í Miðeystri var av, men fyri Heina í Skorini var søgan á ongan hátt liðug

- Eg havi ongantíð tímað so illa upp í eitt flogfar, sum handan dagin í juli á Ben-Gurion floghavnini í Tel Aviv. Eg føldi tað, sum at eg bara líka var sloppin at kagað inn í ein heim, sum fasinerar meg meir enn nakrantíð. Eg havi eisini longu gjørt av, at fara avstað aftur – tað má eg, sigur Heini í Skorini avgjørdur.

Men hví leggja so nógv í eitt stríð, sum er túsundtals kilometrar burturi, og sum tað enn ikki er eydnast sjálvt ídnastu royndum at fáa ein enda á?

- Tí, sum eg segði, er grannin hjá tær svakur, mást tú reagera. Og í einum alsamt meir globaliseraðum heimi eru vit væl øll at kalla grannar, sigur Heini í Skorini.

Hann steðgar á, tigur eina løtu, og kemur so knappliga í tankar um okkurt.

- Einferð, eg stóð inni á einum skitnum wc í einum fátækrabýlingi í Suður-Afrika og longdist heim til tryggu Føroyar, fekk eg eyga á eitt skelti, har tað stóð: "A ship in a haven is safe, but that is not what ships are built for. Also "Eitt skip í havn er trygt, men tað er ikki tað, skip eru gjørd til".

- Onkursvegna hava hasi orðini fylgt mær líka síðani. Tað snýr seg um at tora og tíma at liva, tora at tveita seg út í tað ókenda og ikki minst tora at gera uppreistur móti líkasæluni, sigur Heini í Skorini.

Og so eru tað myndirnar. Javni streymurin av myndum á sjónvarpsskíggjanum av enn einum jøda ella muslimi, sum hevur latið lív í enn eini bumbutasókn, sum hann ikki fær rist av sær longur.

- Um tú situr og stúrir fyri, at tað kanska er ein av tínum vinum, sum liggur og bløðir har á myndini, ber ikki longur til bara at zappa yvir á eina aðra rás ..., sigur ungi havnamaðurin mest sum við seg sjálvan.